# Føroya Reiðarafelag
# Formansfrágreiðing 2007

## Formansfrágreiðing

### Inngangur
Formansfrágreiðingin verður løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Reiðarafelag hin 6. mai 2008. Reiðarafelagið er eitt áhugafelag hjá reiðarnum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku skipabólkarnar og feløg teirra, myndugleikar og stovnar, ið vara av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Nólsoyarstovu og hevur felags umsiting við Føroya Ráfiskaseljarafelag.
Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiskivinnuni og virksemi felagsins í árinum, ið farið er.

### Innihald

**Formannsfrágreiðing Mei 2008**

Hetta er ein søguligur fundur, vit eru til í dag, Føroya Reiðaraafelag fyllir  100 ár í ár.

Vanligt hevur verið til henda fundin, at formaðurin tekur samanum allar skipabólkar og greiðir frá gongdini í farna árinum. Nú eru broytingar í samansetingini av nevndini og koma so teir,  sum varða av sínum bólki at siga eitt sindur um gongdina.

**Sáttmálin**

Á sáttmálaøkinum er friður til Desembur aftur, tá er sáttmálin við Fiskimannafelagið uppsagdur av báðum pørtunum. Yvirmannafeløgini hava vit sáttmála við til nýggjárs.

Allir minnast, at seinastu jól vóru vit í einum verkfalli, sum tíbetur ikki vardi so leingi, sum vit fryktaðu fyri. Verkfallið var púra óneyðug og endaði við at Føroya Fiskimannafelag fekk júst tað burturúr, sum vit á fyrsta fundinum buðu teimum.

Vit hava gjørt avtalu við øll manningarfeløgini, um at fara undir at endurskoða allar sáttmálar, tveir fundir hava verið, uttan at nakað er komið burturúr.

Vit hava eitt oljuprotokollat, har vit saman við øllum feløgunum eru samdir um, at fer oljuprísurin uppum 2,90 kr liturin, skulu vit koma saman at tosa um hvussu tey kunnu taka lut í meirkostnaðinum. Vit hava verið saman og umrøtt hesi viðurskifti og fóru hvør til sín, fyri at vita hvussu farast skuldi fram. Yvirmannafeløgini hava svarað aftur, at tey eru fús at fara undir samráðingar, um hvussu tey kunnu luttaka, men Føroya Fiskimannafelag sigur, at tað kemur ikki uppá tal, at teir taka lut í oljuútreiðslunum. Hetta kunnu vit bara taka til eftirtektar. At eitt fakfelag skúgvar gjørdar avtalur til viks, og tá avtalur ikki verða virdar er eingin grund at gera avtalur. Viðvíkjandi oljuprottokollatinum fara vit ikki at gera nakað, uttan so at øll feløgini eru við.

Hetta saman við øðrum viðurskiftum ger, at tað er ógvuliga ivasamt, um tað loysir seg at fara í nakrar samráðingar aftur við Føroya Fiskimannafelag. Vit vita ikki, um stabilitetur longur valdar í hesum felagnum, og fyri at siga sum er vænti eg, at ringt verður at fáa nakað skilagott samstarv við hetta felagið.

Tá samráðingar hava verið í seinastuni, hevur felagið Samtak sitið við borðið, vit halda ikki hetta felagið hevur nakað við sjóvinnu at gera, og sær heldur ikki út til at skilja tað vit tosa um. Tað er eisini tíðiligt at arbeiðsfeløgini á landi hava ikki somu áhugamál sum Føroya Fiskimannafelag, tað síggja vit til dømis í ALS málinum. Nú hálovar Føroya Fiskimannafelag hesum nýggja samtakinum.
Heilsanin vit fingu nú 1. mei av Vaglinum var ikki tespilig. At verða samettir við ringastu bølmenni og tað ið verri er, er ikki tað vit høvdu væntað. Fiskimenn eru ikki tvingaðir at mynstra við nøkrum skipi, so ilt er at skilja, at teir taka undir við hesum eitrandi úttalilsum.

Tað seinasta, vit hava fingið at vita frá fiskimálaraðharranum er, at ein fiskidagabanki skal setast á stovn. Hvussu hetta kemur at virka, vita vit einki um, men hetta er so grundleggjandi broytingar í okkara umstøðum, at vit mugu fáa at vita í góðari tíð, um hetta kan brúkast til nakað.

Vit eru so bundnir at gomlum vanabundnum sáttmálum, at vit fáa ikki gjørt nakað sum ber brá av nýhugsan, kanska er tað neyðugt júst nú, at vit bróta uppúr nýggjum og hvørt skip ger sín sáttmála.

## Framtíðarútlit

Eitt sum fiskiflotin líður undir nú er, at menn fara í í land at arbeiða, tað er so eitt tekin um, at vit tapa í kappingini um fólk.
Tað er kanska einki at siga til tað, teir lesa sjálvandi bløðini, har tað verður gjørt nógv burtúr, hvussu gott tað er fyri land okkara at menn gevast at fiska. Tað eru teir sum siga, at landið verður nógv ríkari av hvørjum manni sum fer í land. Onkur annar hevur fingið livur í rangastrúpan, og rør uppundir, at fiskimenn skulu fara í land at skriva bøkur.

Eitt er at berjast við vaksandi útreiðslur, men tá eitt fastlønt kór á landi í øðrumhvørjum blað sigur seg hava uppskriftina uppá, hvussu trupulleikarnir í fiskivinnuni skulu loysast, er tað einki stuttligt longur.

## Reiðarafelagið 100 ár

Sum tíðirnar eru nú, er veruliga grund til at stúra fyri gondini í flestu skipabólkunum. Nú er tað oljan, sum ríður okkum sum ein marra afturat fallandi fiskaprísum.

Einki nýtt er undir sólini og soleiðis er eisini hjá okkum. At vit eru á veg niður í ein aldudal, eigur ikki at fáa okkum at falla í fátt. Teir sum fáast við fiskiskip vita, at hetta er ikki fyrstu ferð, at barometrið fellir so ógvusliga. Skrúva vit tíðina júst 100 ár aftur, lesa vit í einum stubba í Tingakrossi, at menn eru komnir saman til fundar her í Havnini til “at drøfte de ret fortvivlede fiskeriforhold”.

Úrslitið varð, at Reiðarafelagið varð stovnað 16. desembur 1908. Í einum tíðindastubba í Dimmu frá 19 desembur stendur millum annað, at "hvis kutterflåden ikke kan bære sig": " det ville blive et tordenbrag for største parten af befolkningen og betyde økonomisk ruin og afhængighed for mange hjem på øerne. I den seneste tid har udsigterne været mørke for kutterfiskeriet. Man ser at det ene fiskeskib efter det andet udbydes til salg fordi det ikke kan bære sig. Nogle redere har set sig nødsaget til at lade skibene ligge hele året for ikke at komme længere ud i gæld og man har hørt fra flere rederier at de hellere vil lade skibene fortøje end fortsætte som tilstandene er nu". Søgan endurtekur seg, men umstøðurnar hjá okkum sum fólk í Føroyum eru hóast alt munandi betri í 2008.

Havi hugt eitt sindur eftir, hvussu umstøðurnar vóru í 1908. Vit eru tá bara góð 50 ár eftir at Kongiligi Handilin varð tikin av og veruligur framburður byrjaði.

Hetta árið vóru 128 skip í flotanum, meðalinntøkan fyri skipið var 9000 kr. Meðalparturin hetta árið var 265 kr. Skipatalið vaks spakuliga tey næstu árini, men veiðivirðið vaks ikki nakað serligt. Árini frammanundan mugu helst hava verið góð, tí Mortensen-menninir á Tvøroyri gjørdu nýggjan stásiligan kontórbyggning við handli í, og góvu bygdini eina nýggja kirkju til gávis. Kirkjan er sostatt javngomul við Reiðarafelagið og hevði føðingardag nú fyrsta mei.

Danskararnir hava eitt orðafelli um at " en rask lille krig" er gott fyri búðskapin. Hetta er sjálvandi eitt paradoks, men tað skerst ikki burtur, at kríggini hava bøtt um búðskapin, men sjálvandi hevur hetta havt stórar menniskjaligar umkostningar við sær.

Fyrri heimsbardagi gjørdi, at prísurin á fiski fór upp og grunnarnir fingu frið fyri øllum teimum ensku trolarunum, sum tógaðu næstan í land nógvastaðni. Úrslitið varð, at meðalúrtøkan vaks og gav í 1919, 83000 krónur uppá skipið. Manningaparturin var heilar 1810 krónur. Hetta árið toppaði til inntøku og dalaði so líka niður í 530 krónur í 1932.

Fyrra kríggið kravdi eisini sítt av okkum, vit vita allir um sluppirnar, sum vóru søktar á Bankanum. Onkrar vórðu ikki tryggjaðar og førdi til fíggjarligan undirgang fyri eigararnar.

Nakað eftir kríggið fall prísurin aftur, og vit komu inn í ein av aldudølunum og komu heilt niður á 27000 krónur uppá skipið 1927.

Vit høvdu gjørt nakrar royndir undir  Grønlandi við snøri, men tað var ikki nakað serligt komið burturúr, men so 18. august 1925 kom norska  Faustina undan Grønlandi kjokkfull við saltfiski . Teir settu nakrar føroyingar av, sum høvdu verið við og  boðaðu frá ørgrynnu av toski í Vesturgrønlandi.  Tað man hava verið sum tá amerikanarar hoyrdu um gullið í Klondyke. Allir sum áttu skip sóu nýggjar møguleikar at veiða.

Tá byrjaði aftur ein nýggj tíð í okkara fiskiskapi. Trupulleikar við at sleppa at fiska nøkurlunda frítt vóru stórir, men í 1927 opnaði Føroyngahavnin, og tað var ein stór hjálp hjá okkara skipum. Tað var Navigatørfelagið, sum gekk á odda í stríðnum við donsku mynduleikarnar í Grønlandi.  Í 1927 vóru 35 skip í Grønlandi og í 1929 vóru heili 80 vestan fyri Kappan.

Tá krakkið í Wallstreet skolaði inn yvir okkum, fekk tað eisini ógvuligar avleiðingar fyri okkum her á landi, og ein ring  tíð við nógvum húsagangi og tí sum harvið fylgir.

Í 1932 var støðan so ring, at Løgtingið setti eina kreppunevnd at hjálpa til. Stórar nøgdir av saltfiski lógu óseldar, tí ikki slapst av við klippfiskin. Har suðuri hjá okkum førdu teir fisk, sum pink var komið í út á fjørðin og søktu niður. Danski statskassin mátti hjálpa Løgtinginum og var uppií við at veita trygdir fyri útgerðarlán til skipini.

Stór ósemja var eisini ímillum Reiðarafelagið og Føroya Fiskimannafelag. Semingsmaðurin kom ongan veg. Løgtingið setti eina kreppunevnd, sum skuldi royna semju og koma við uppskoti um nýggjan sáttmála, men tað kom einki burturúr. Stórar ósemjur vóru ímillum feløgini um býti av veiðuni, sjálvandi tá krubban er tóm býtast hestarnir.

Hesi árini fyrst í 30-unum eru helst tey svárastu peningaligu árini, vit vita um í okkara fiskivinnusøgu. Tað var næstan hungur og hall um allar Føroyar. Prísurin á saltfiski var 24 oyru fyri kilo í 1908 og fór heilt uppá 80 oyru í 1919, fall so niður aftur 18 oyru í 1932.

Í 1936 var stóra felagið J. Mortensen á Tvøroyri  selt á tvingsilsølu fyri 90 túsund krónur. Hetta felagið átti í 1919 30 skip, nógvar úthandlar og farmaskip og hevði heilar 1,6 milliónir krónur á bók.

Í 1939 byrjar eitt nýtt kríggj, sum kravdi so ómetaliga nógv av okkum, men búðskapurin vaks nógv. Nú var tað ísfiskurin til Onglands sum gjørdi munin og í 1944 seldu vit heili 40 túsund tons fyri 52 milliónir krónur á bretska marknaðinum. Umkostingarnir í mannalívum vóru stórir, og vit mistu 25 prosent av skipunum. Ei undur í at Churhill segði, at hetta skuldu teir ikki gloyma okkum.

So gekk skjótt niðurá aftur, til vit aftur endaðu í eini djúpari kreppu fyrst í 50-unum. Gomlu kolatrolararnir og tað sum harvið fylgdi, krakkið í Sjóvinnubankanum, sum vit minnast frá teimum árunum.

Mitt í 50-unum var J. F. Kjølbro fyritøkan á hæddini, og tað sá út til at henda fyritøkan var so stór, at einki kundi vika hana, men søgan sigur okkum, hvussu gekst. Eg kan líka skoyta uppí, at í 1913 skuldi Jógvan Kjølbro og bróðurin Dávur í Gerðum keypa sluppina “Solo”, sum stóð teimum í boði fyri 6500 krónur. Teir áttu 4000 krónur og ætlaðu at lána 3000 krónur. Hvørki Føroya Banki ella Sparikassin mettu projektið “bæredygtigt”, so teir fingu einki lán. Jens í Dali lænti teimum írestandi peningin, sum hann so fekk aftur annað árið eftir.

Soleiðis hevur gingið upp og niður, men higartil hava vit altíð komið okkum aftur á føtur.

Nýggja tíðin byrjaði helst miðskeiðis í hálvtrýssunum, tá vit byrja at byggja nýggj stálskip. Hetta var eisini eftir eina djúpa kreppu, tað vóru djarvir menn við stuðuli frá politikkarum, sum sóu at neyðugt varð at hugsa nýtt og stórt. Politikkararnir bóru so í bandi at skaffa lagaliga figging, sum eggjaði monnum til at byggja skip. Tá var ein hópur av føroyingum við íslendskum skipum og vunnu nógvar pengar, men tá vit fótaðu okkum aftur og fingu nýggj og góð skip, komu allir heimaftur at sigla.

Aftaná kongiligu handilstíðina byrjaðu vit fiskiskap undir Føroyum, síðani fóru vit til Íslands, sum var álitið í nógv ár, so kom Grønland, Barentshavið, New Foundland, Labrador, Skt. Lawrentsflógvin, Eysturdjúpini, Norðsjógvurin, Eystursjógvurin, ja nakrir hava roynt í Afrika, onkur í Suðuramerika og nú eru nakrir í Stillahavinum. Jú vit hava verið víða, allatíðina leitandi eftir fiskinum, sum ger at vit kunnu búðleikast her á landi.

Tað ber sjálvandi ikki til at viðgera eitt so aktivt 100 ára skeið her, men her eitt sindur um søguna. Seinni í heyst eiga vit at gera meiri burturúr 100 ára føðingardegnum, og tá verður høvi at líta aftureftir og taka samanum, hvussu hevur gingist. Vit mugu tó ásanna, at hóast djúpar kreppur, er væl komið burturúr, og vit hava eitt gott og trygt land at búgva í. Hetta sigur ikki so lítið um fólkið sum her býr.

Nú tá vit eru komnir inn í nýggju øldina eru tíðir broyttar nógv frá 1908, nú eru vit trokaðir innum eingjargarðarnar hjá okkum sjálvum aftur, talið av føroyskum skipum, sum royna uttanfyri føroyskan sjógv er tódnað nógv og felags fyri hesi er, at tey hava klárað seg væl, tíbetur.

Hóast tung skýggj taka seg upp í havsbrúnni einaferð enn, eiga vit ikki at missa móti. Sálamon sigur, at brotið mót sígur mergin úr beininum.

Vit hava tikið mangt nosið fyrr, so mótið og vónina mugu og skulu vit ikki missa.